# Bilar

Nr. 113 • hósdagur • 17. juni 2004 • 78. árg.

## MC-treff á Bileftirlitinum

**Fríggjadagin 25. juni verður eitt sokallað MC-treff á Bileftirlitinum í Havn, har tær luttakandi motorsúkklurnar verða sýnaðar, meðan eigararnir kunnu fáa sær ein kaffimunn og eitt prát saman við øðrum motorsúkklueigarum**

TÍÐINDASKRIV

Seinastu árini er talið av innfluttum motorsúkklum til Føroya økt munandi.

Tí fer Bileftirlitið nú at skipa fyri regluligum sýni av hesum akfarabólki.

Ætlanin er at royna við einum heldur ørvísi tiltaki fríggjadagin 25. juni. Tiltakið verður á Bileftirlitinum í Tórshavn, millum kl. 12.30 og 18.00.




*Jákup Jacobsen, stjóri á Bileftirlitinum, og Búgvi Apol, deildarleiðiar. MC-treffið verður á Bileftirlitinum í Havn fríggjadagin 25. juni millum kl. 12.30 og 18.00*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Talan er um eitt sonevnt MC-treff, har allir motorsúkklueigarar eru vælkomnir.

Tær luttakandi súkklurnar verða síðan kannaðar av sýnsmanningini á Bileftirlitinum, meðan eigararnir kunnu fáa sær ein kaffimunn og eitt prát saman við hinum motorsúkklueigarunum.

Á henda hátt skuldi verið gjørligt hjá okkum at fingið sýnað eitt stórt tal av súkklum eftir einum degi, samstundis sum eigararnir kunnu fáa ein stuttligan dag burtur úr tiltakinum.

Tær motorsúkklur ið ikki koma við til tiltakið verða innkallaðar til sýn seinni.

## Ov fá nýta trygdarbeltini

TÍÐINDASKRIV

Sum kunnað varð um frammanundan í pressuni skipaði Politiið fyri ferðsluátakinum "Trygdarbelti v.m." vikurnar 22 og 23 í 2004.

Samanlagt vóru 2743 akfør kannað. Ikki øll akførini vóru í lagi. 439 rapportir vóru skrivaðar. Á 61 akførum vóru ljósini ikki í lagi, 267 brúktu ikki trygdarbeltini, 121 høvdu ikki koyrikort hjá sær, á 24 akførum vóru dekkini ikki í lagi, og ein var tikin fyri rúsdrekkakoyring.

Bøturnar komu samanlagt upp á 117.685,- krónur.

Undir átakinum hjá politinum í ár hava 267 fólk fingið bót fyri ikki at vera íbundin. Talið á øðrum lógarbrotum er munandi lægri.

Í somu kanningum í 2003 sótu 144 fólk ikki íbundin og í 2002 var talið 201.

Á hvørjum ári letur landslæknaembætið eina heilsulagslýsing. Har verður nomið við nýtsluna av trygdarbelti í ferðsluni.

Í seinastu útgávu 7. juni 2004 verður mett, at umleið helvtin av teimum 44, sum ikki vóru í bundin, tá tey lótu lív í ferðsluni árini 1986 til 2003 kundu havt bjargað sær lívinum, um tey brúktu trygdarbelti.

Sp/f Føroya Oljusøla:

## Pennzoil smyrjioljuskeið á Hotel Vágum

**Leygardagin 5. juni skipaði Pennzoil fyri smyrjioljuskeiði á Hotel Vágum. Norðmaðurin, Thomas Bull Enger frá Bull Enger A/S í Oslo, greiddi frá hvat liggur aftan fyri merkingar av teimum ymsu oljuproduktunum og um krøvini frá verksmiðjunum**

SMYRJIOLJA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fólk frá ymsum fyritøkum í Føroyum vóru á einum smyrjioljuskeiði á Hotel Vágum leygardagin 5. juni. Tað var Marner við Skipá frá Sp/f Føroya Oljusølu í Hoyvík, sum skipaði fyri skeiðinum. Fyritøkan umboðar oljuproduktini frá Pennzoil í Føroyum.

Norðmaðurin Thomas Bull Enger, marknaðarleiðari hjá norska Pennzoil umboðnum, Bull Enger A/S, greiddi frá krøvunum, ið verða sett til tey ymisku oljuproduktini. Eisini greiddi hann frá, hvat liggur aftan fyri merkingarnar á teimum ymsu oljuproduktunum, so sum tøl, bókstavir og aðrar merkingar.

Pennzoil er eitt amerikansk smyrjioljufelag, sum framleiðir øll sløg av oljuproduktum til skip, bátar, øll sløg av akførum og til ídnaðin, so sum hydraulikolju og líknandi. Tó verður ikki brennievni framleitt, eitt nú bensin og dieselolja.

Samstarvað verður millum annað við bilverksmiðjur, tá nýggjar motorar, girkassar og annað skal gerast. Til dømis er automatgirkassin á nýggja Chrysler Voyager gjørdur í samstarvi við Pennzoil.




*Thomas Bull Enger frá Bull Enger A/S í Norra og Marner við Skipá frá Sp/f Føroya Oljusølu, sum umboðar Pennzoil í Føroyum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

### Verið við frá byrjan

Pennzoil hevur sín uppruna frá tíðarskeiðinum, tá olju av fyrstan tíð varð funnin í Pennsylvania síðst í 1880-unum. Tá var felagið South Penn Oil Company við í menningini av Bradford, sum er heimsins fyrsta oljuleitiøki.

Fyrst í 1960-unum bleiv South Penn Oil Company lagt saman við øðrum oljufeløgum og nýggja felagið fekk navnið »Pennzoil Company«, sum fyrstu ferð var børsnoterað í juli 1963 undir navninum »Pennzoil«. Pennzoil hevur í dag 22 prosent av amerikanska smyrjioljumarknaðinum og kann breggja sær av at vera mest selda motoroljan átjanda árið á rað.

Síðani fyrst í 1900-talinum hevur fyritøkan verið marknaðarførd í Norra, og síðani 1988 hevur norska fyritøkan Bull Anger A/S umboðað Pennzoil við høvuðsskrivstovu í Sandefjord.

### Yvir 20 ár á baki

Í Føroyum hevur Pennzoil yvir 20 ár á baki. Í 1983 fór George Jacobsen undir at innflyta Pennzoil. Hann var umboð líka til hann í 2002 gavst fyri aldur. Eftir tað hevur tað verið Føroya Oljusøla, ið hevur tikið sær av at selja og umboða Pennzoil í Føroyum.

Marner við Skipá, sum eigur og rekur Sp/f Føroya Oljusøla, sigur, at teir satsa upp á at vera totalleverandørar av oljuproduktum til verkstøð og til ídnaðin.

Tó er vøruúrvalið breiðari enn so, og Sp/F Føroya Oljusøla umboðar eitt nú oljuprodukt frá ELF og sápu frá Americol, ið eitt nú er framúr sum reinsievni, um óhappið er hent og olja hevur dálkað onkrastaðni.



*Nýggi Focus verður ein størri bilur enn forgangarin*

## Nýggjur Focus í 2005

**Fyrst í komandi ári kemur ein heilt nýggjur Ford Focus, ið avloysir verandi Focus, sum hevur verið á marknaðinum síðan 1998. Bilurin verður fyrstu ferð sýndur fram á Paris Motor Show í september**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ford Focus kom fyrstu ferð á marknaðin í 1998 sum avloysari fyri Ford Escort. Bilurin hevur roynst sera væl og er ein av mest seldu bilum yvirhøvur.

Á altjóða bilaframsýningini, Paris Motor Show, í september, verður ein heilt nýggjur og størri Focus sýndur fram.

Hópframleiðslan byrjar í oktober, og bilurin kemur hendan vegin fyrst í komandi ári.

Bilurin verður bygdur yvir sama plattform sum Focus C-Max, Volvo S40 og Mazda3.

Um motorskránna vita vit at ein av bensinmotorunum verður ein 2,0 litur við 150 hk og tveir dieselmotorar við avikavist 109 og 145 hk.

*Kelda: FDM / Motor*



*Aftan líkist hann nógv núverandi Focus*

## Ellisakfør á Selatrað longsta dag

ÚTFERÐ

*Tíðindaskriv frá Føroya Ellisakførum*

Sunnudagin verða ellisakfør aftur at síggja á vegunum. Seinastu árini hava

Føroya Ellisakfør skipað fyri útferð longsta dag, og soleiðis verður aftur í ár. Hóast longsti dagur er mánadagin, leggja ellisakførini til brots sunnudagin, tá farið verður til Selatrað.

Farið verður frá felagshølunum yviri við Strond í Havn sunnumorgunin kl 10, og fara akførini í raðkoyring norðeftir, har koyrt verður gjøgnum bygd-irnar á vegnum, eitt nú Kollafjørð, Hvalvík og Streymnes og bygdirnar við Skálafjørðin.

Kl 13 verður grillað á Skótadeplinum á Selatrað, har ætlanin eisini er, at børnini skulu kunna hugna sær.

Av tí at steðgað verður ymsa staðni á vegnum verða fólk biðin um at hava kaffi o. s. fr. við sjálvi.

Kostnaðurin fyri at verða við er 50 kr fyri hvønn, íroknað grill og okkurt afturvið.

Tey, ið vilja verða við, verða biðin um at tekna seg hjá Petur á telefon 317036 í seinasta lagi hóskvøldið.



*Ellisakfør á Kongabrúnni flaggdagin*

## Lexus seldir í Japan



Toyota byrja fyrst nú søluna av Lexus í heimlandinum Japan. Lexus verða gjørdir í Japan, men higartil bert til útflutnings

*Kelda: Motor Magasinet*

## Sama bilmerki aftur



Minni enn helvtin av týsku bileigarunum keypa sama bilmerki aftur, tá tann brúkti bilurin verður skiftur út. Mest trúfastir er Audi og Mercedes-Benz eigararnir

*Kelda: Motor Magasinet*

## Kia og Hyundai á havsins botni



Á havsins botni í Suðurkinesiska havinum liggja 4190 Kia og Hyundai bilar eftir ein samanstoyt millum eitt suðurkoreanskt bilaflutningsskip og eitt annað skip. Meira enn helvtin av bilunum skuldu til Bretlands

*Kelda: Motor Magasinet*